# Molde spilti seg burtur

**Rosenborg megnaði bara javnleik leygardagin, men teir gjørdust sunnudagin meistarar, tí Molde tapti á útivølli**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Ellinta árið á rað hevur Rosenborg úr Tróndheimi vunnið NM í fótbólti. Tað man vera fram ímóti at vera einastandandi í heiminum, og í norsku pressuni siga teir seg ikki ivast í, at tað er heimsmet fyri einstakan spælara, at 36 ára gamli Bent Skammelbrud hevur verið við til at vinna ellivu gullkrónur á rað við sama felag.

Rosenborg spældi leygardagin. Tá vóru teir í Sogndal, og úrslitið var 2–2. Tað merkisverda við uppgerðini var, at trý av teimum fýra málunum vórðu skorað upp á brotsspørk. Sogndal legði seg á odda við brotssparki í 6. minutti, ellivu minuttir seinni javnaði Rosenborg við brotssparki, RBK legði seg á odda í 54. minutti, og sjey minuttir undan leikloki javnaði Sogndal upp á brotsspark.

**Molde heilkiksaði**

At RBK leygardagin bara megnaði javnleik í næstsíðsta umfarinum gav Molde møguleikan sunnudagin at minka um munin til bara eitt stig undan síðsta umfarinum. Men Molde spilti seg burtur á Nadderud stadion, sum er heimavøllurin hjá Stabæk. Heimaliðið var nógv meiri ágangandi, og einki í Molde avrikinum boðaði frá, at gestirnir stríddust fyri at halda tørn í gullstríðnum.

Úrslitið var 4–2, og harvið var Rosenborg meistari. Tá fimm minuttir vóru farnir, var støðan 2–0. Fyrra málið var skot úr sekstan metrum, og tað næsta var sjálvmál. Á hálva tímanum minkaði Molde um munin við brotssparki. Stutt undan hvíldini økti Stabæk til 3–1, og í 2. hálvleiki høvdu teir nógvar møguleikar, tí Molde royndi at flyta spælið fram á vøllin. Seks minuttir undan leikloki varð tað 4–1, og í yvirtíðini skoraði Molde til 4–2.

Hóast hann mikukvøldið megnaði besta avrikið av øllum í Hannover, so fekk Jákup Mikkelsen ikki pláss í Molde málinum sunnudagin. Jákup sat á beinkinum og hugdi at dystinum, og tað gjørdu tveir av bestu kendu norðmonnunum eisini. Kjell Inge Røkke sat og blakaði sær fyri at halda heystarkulanum burtur, og norski forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, sat eisini og tók á við Molde, sum er hansara lið.

Molde vann silvur í 1998 og í 1999. Nú Rosenborg undan síðsta umfarinum er fýra stig undan teimum, er tað greitt, at Molde ikki fer at megna meiri enn silvur í ár. Tað er møguleiki fyri, at Lyn fer at hótta næstfremsta plássið. Í gjárkvøldið skuldi Lyn spæla í Skien ímóti Odd Genland. Um teir vunnu, so eru teir undan síðsta umfarinum á sama stigatali sum Molde.

**Meiri venjing**

Molde venjarin, Gunder Bengtsson, hevði ætlað, at Molde skuldi vera fyrsta felagið í ellivu ár, sum megnaði at koppa Rosenborg av norsku fótbóltstrónuni. Tað verður ikki í ár, men svenski venjarin er longu farin at fyrireika seg til, hvussu tað skal eydnast komandi ár.

Hann heldur, at Molde spælararnir skulu venja uppaftur meiri, enn teir hava gjørt. Tað eru spælararnir ikki samdir við honum í. Teir halda ikki, at tað hevur sást í dystunum, at teir hava verið verri fyri enn aðrir. Heldur halda teir, at verjan ikki hevur verið nóg avgjørd, tá tað stóð mest á.

– At vit báðu ferðirnar taptu ímóti Rosenborg hevur verið avgerandi, segði Molde venjarin, tá ið tað var greitt, at RBK er meistari fyri 11. ferð.

**Sogndal í vanda**

Botnliðið Start var á Ullevaal ímóti Vålerengen, sum vann 4–0. Moss tapti 2–0 í Bodø, sum harvið bjargaði sær undan beinleiðis niðurflyting. Moss hongur í sera klønum tráði.

Brann úr Bergen hevði møguleika at tryggja sær eitt ár afturat í bestu deildini. Í steðginum vóru teir á odda í heimadystinum ímóti Lillestrøm, men teir taptu 2–1. Lillestrøm kláraði seg leingi illa, men nú eru teir komnir undan. Nú mugu teir í Bergen bíta negl í hvussu so er eina viku afturat.

Eftir javnleikin ímóti RBK er Sogndal komið undan beinleiðis niðurflytingini, men teir eru framvegis í vanda fyri at gerast partur av endaspæli um pláss í bestu deildini.

Í síðsta umfarinum, sum verður spælt nú sunnudagin, skal Sogndal spæla í Molde. Rosenborg fær vitjan av Brann, og hinir dystirnir eru Lillestrøm –Odd Grenland, Moss–Stabæk, Start–Bodø/Glimt, Lyn–Viking og Bryne–Vålerengen.

# Jógvan Martin heldur fram



*Fyrsta royndin sum venjari hjá NSÍ var væleydnað, og nú er gjørt av, at Jógvan Martin Olsen tekur í hvussu so er eitt ár afturat í Runavíkini*

Leygarkvøldið varð greitt, at Jógvan Martin Olsen er ársins venjari í 2002. Og nú er greitt, at hann eisini komandi ár fer at hava ábyrgdina av NSÍ.

– Eg havi skrivað undir nýggjan eitt ára sáttmála við NSÍ, segði Jógvan Martin Olsen, áðrenn hann leygardagin fór til Georgia við U–19 landsliðnum.

Fyrr í summar ljóðaði, at NSÍ og Jógvan Martin Olsen høvdu tvey ára samstarvssáttmála, men tað var ikki rætt.

At Jógvan Martin heldur fram í NSÍ er upp á ein máta merkisvert. At NSÍ vann steypakappingina og endaði næstfremst í landskappingini legði sjálvandi upp til, at samstarvið fór at halda fram.

Men tað er merkisvert á annan hátt. Í øllum hinum feløgunum, sum vóru í 1. deild seinasta kappingarár, verður annar venjari í januar komandi ár, enn tað var í januar í ár. Í fimm feløgum vórðu venjararnir skiftir út, tí tað ikki gekk, sum tað varð vónað. Hesi feløgini vóru B68, Skála, HB, VB og TB. Í hinum fýra feløgunum er av ymsum orsøkum gjørt av at skifta venjara. Feløgini eru KÍ, GÍ, EB/Streymur og B36.

Einasta felagið í 1. deild komandi ár, sum – umframt NSÍ – fer at hava sama venjara, sum teir høvdu í fjør, verður FS Vágar. Albert Ellefsen var venjari, tá FSV fór undir stríðið at vinna seg uppaftur í 1. deild, og hann verður eisini venjari, tá FSV komandi ár fer at royna at verja plássið í bestu deildini.

-jh

# Hanus nýggjur á U–19 landsliðnum

**Fyrsti dysturin í EM undankappingini í Georgia verður ímóti Ukreina seinnapartin í dag**

U–19 LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Leygardagin fór U–19 landsliðið úr Vágum. Henda síðsta føroyska fótbóltsferðin í hesum árinum hevur EM undankappingina í Georgia sum mál.

Fyrsti dysturin verður spældur seinnapartin í dag. Hann verður ímóti Ukreina. Hósdagin er mótstøðuliðið Belgia, og leygardagin skulu Føroyar spæla ímóti Georgia. Allir dystirnir verða spældir klokkan 16 lokala tíð.

Eingin ivast í, at mótstøðan fer at vera ivaleysa stór í øllum dystunum. Og tað ber væl til at ímynda sær, at mótstøðuliðini fara at taka føroyska liðið í uppafturstórri álvara, eftir at a–landsliðið mikukvøldið í síðstu viku stóð fyri so góðum avriki á útivølli ímóti Týsklandi.

Undan fráferðini vandi U–19 landsliðið fleiri ferðir. Jógvan Martin Olsen var í Litava og Týsklandi. Tí hevði hjálparvenjarin, Mathias Davidsen, ábyrgdina av venjingunum.

Andy Olsen úr NSÍ var noyddur at geva avboð. Í hansara stað varð Hanus Eliasen úr ÍF úttikin. Hann hevur alt kappingarárið verið fastur maður á miðvøllinum hjá ÍF í 2. deild. Í síðsta umfarinum, tá ÍF á heimavølli vann 1–0 ímóti FS Vágum, var Hanus Eliasen ímillum teir bestu eyðsýndu.

Sum vit áður hava nevnt, so kom tað illa við, at liðformaðurin á føroyska liðnum, Ingi Højsted, sum spælir í Arsenal, var noyddur at geva avboð, tí hann ikki var komin nóg væl fyri seg eftir skaða. Men kortini verður mett, at føroyska liðið er væl mannað.

Teir, sum hesa vikuna eru í Georgia, eru hesir: Gunnar Nielsen, Frem, Poul Eli Bærentsen, TB, Eli Thorsteinsson, HB, Áki Petersen, Skála, Rasmus Nolsøe, Brøndby IF, Rani D. Christiansen, HB, Marni Djurhuus, EB/Streymur, Jann Ingi Petersen, B68, Hans Pauli Samuelsen, EB/Streymur, Bergur Midjord, B36, Símun Samuelsen, VB, Hanus Eliasen, ÍF, Hanus Thorleifsson, Skála, Bárður Danielsen, Skála, Rókur Jespersen, Brøndby IF, Bjarni Jørgensen, HB, og Magnus Skoralíð, GÍ.



# Johan B. Hansen millum málskjúttarnar

**Christian Høgni Jacobsen var alla tíðina á vongverjanum í høgru hjá Vejle, sum ikki megnaði meiri enn 1–1 á heimavølli ímóti botnliðnum**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Ein føroyskur landsliðsspælari var í vikuskiftinum millum málskjúttarnar í næstbestu donsku deildini. Men tað var ikki Christian Høgni Jacobsen. Hann var vongverji í høgru allar 90 minuttirnar, tá ið Vejle hevði vitjan av HIK, sum er avgjørda botnliðið. Tí var tað púra óvæntað, at HIK legði seg á odda, tá seinna umfarið var hálvrunnið. Innskifti Kenneth Knudsen javnaði til 1–1, tá tað restaðu níggju minuttir. Men tað var stórt vónbrot fyri teir 1.030 áskoðararnar, at Vejle ikki megnaði at vinna ímóti botnliðnum. Áskoðararnir mundu hava roknað við størsigri.

Hóast Herfølge á heimavølli tapti 3–1 ímóti Fredericia, so eru teir framvegis oddaliðið. Frem vann 3–1 í Odense ímóti B 1909, og nú er gamla arbeiðarafelagið í Valby næstfremst.

Randers Freja tapti 2–0 á heimavølli ímóti Skjold, sum eftir góðu gongdina seinastu vikurnar ikki verður roknað sum nakar lættisoppur. Hóast tapið er Randers Freja á triðja plássinum, og Vejle er nummar fýra.

Føroyska málið skoraði Johan B. Hansen, tá Horsens vann 4–2 á útivølli ímóti Ølstykke, sum ikki hevur sama flogið, sum teir høvdu fyrstu nógvu vikurnar í nýggja kappingarárinum.

Johan B. Hansen, sum var á landsliðnum í fjør, og sum hevur verið skaðaplágaður, síðani hann flutti úr OB og aftur til barndómsfelagið Horsens, skoraði fyrsta málið, tá tíggju minuttir vóru farnir.

HFK Sønderjylland vann 2–0 á Tingbjerg stadion í Keypmannahavn, sum er heimavøllur hjá Brønshøj. Og Hvidovre, sum er triði aftast, megnaði ikki meiri enn 1–1 á heimavølli ímóti B 1913 úr Odense.

**Danska superligan**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK | 12 | 7 - 3 - 2 | 18 | 15 | 3 | 24 |
| 2 | AaB | 12 | 6 - 1 - 5 | 19 | 18 | 1 | 19 |
| 3 | Brøndby (M) | 12 | 5 - 3 - 4 | 23 | 15 | 8 | 18 |
| 4 | Esbjerg | 12 | 5 - 3 - 4 | 25 | 24 | 1 | 18 |
| 5 | Farum | 12 | 6 - 0 - 6 | 17 | 17 | 0 | 18 |
| 6 | OB (S) | 12 | 5 - 2 - 5 | 19 | 16 | 3 | 17 |
| 7 | Køge | 12 | 5 - 1 - 6 | 21 | 23 | -2 | 16 |
| 8 | FCM | 12 | 4 - 4 - 4 | 16 | 18 | -2 | 16 |
| 9 | AGF | 12 | 4 - 3 - 5 | 17 | 21 | -4 | 15 |
| 10 | Viborg | 12 | 3 - 5 - 4 | 20 | 22 | -2 | 14 |
| 11 | AB | 12 | 3 - 4 - 5 | 14 | 17 | -3 | 13 |
| 12 | Silkeborg | 12 | 3 - 3 - 6 | 14 | 17 | -3 | 12 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

**Danska 1. deild**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Herfølge | 12 | 8 - 1 - 3 | 27 | 18 | 9 | 25 |
| 2 | Frem | 12 | 7 - 3 - 2 | 28 | 20 | 8 | 24 |
| 3 | Randers F. | 12 | 7 - 1 - 4 | 26 | 18 | 8 | 22 |
| 4 | Vejle | 12 | 6 - 3 - 3 | 19 | 15 | 4 | 21 |
| 5 | Skjold | 12 | 6 - 2 - 4 | 24 | 12 | 12 | 20 |
| 6 | Fredericia | 12 | 5 - 4 - 3 | 19 | 14 | 5 | 19 |
| 7 | Ølstykke | 12 | 5 - 4 - 3 | 28 | 27 | 1 | 19 |
| 8 | HFK Sønderj. | 12 | 5 - 3 - 4 | 27 | 24 | 3 | 18 |
| 9 | Brønshøj | 12 | 4 - 4 - 4 | 15 | 13 | 2 | 16 |
| 10 | B 1913 | 12 | 4 - 4 - 4 | 19 | 20 | -1 | 16 |
| 11 | FC Aarhus | 11 | 4 - 1 - 6 | 18 | 18 | 0 | 13 |
| 12 | B93 | 11 | 4 - 1 - 6 | 17 | 20 | -3 | 13 |
| 13 | AC Horsens | 12 | 3 - 3 - 6 | 19 | 23 | -4 | 12 |
| 14 | Hvidovre | 12 | 2 - 4 - 6 | 12 | 26 | -14 | 10 |
| 15 | B 1909 | 12 | 2 - 3 - 7 | 18 | 27 | -9 | 9 |
| 16 | HIK | 12 | 2 - 1 - 9 | 9 | 30 | -21 | 7 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Atli Gregersen (Randers Freja),
Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Norska tippeligan**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rosenb. (M) | 25 | 16 - 5 - 4 | 53 | 30 | 23 | 53 |
| 2 | Molde | 25 | 15 - 4 - 6 | 45 | 23 | 22 | 49 |
| 3 | Lyn | 24 | 14 - 4 - 6 | 35 | 27 | 8 | 46 |
| 4 | Viking | 25 | 10 - 11 - 4 | 43 | 31 | 12 | 41 |
| 5 | Odd. Grenl. | 24 | 12 - 4 - 8 | 35 | 26 | 9 | 40 |
| 6 | Stabæk | 25 | 11 - 6 - 8 | 41 | 32 | 9 | 39 |
| 7 | Lillestrøm | 25 | 9 - 6 - 10 | 34 | 30 | 4 | 33 |
| 8 | Våleranga | 25 | 7 - 11 - 7 | 36 | 29 | 7 | 32 |
| 9 | Bryne | 25 | 8 - 6 - 11 | 36 | 37 | -1 | 30 |
| 10 | Sogndal | 25 | 8 - 5 - 12 | 34 | 48 | -14 | 29 |
| 11 | Bodø/Glimt | 25 | 8 - 4 - 13 | 35 | 41 | -6 | 28 |
| 12 | Brann | 25 | 8 - 3 - 14 | 35 | 48 | -13 | 27 |
| 13 | Moss | 25 | 6 - 6 - 13 | 30 | 42 | -12 | 24 |
| 14 | Start | 25 | 2 - 5 - 18 | 21 | 69 | -48 | 11 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)

# Uppflytararnir seta dagsskránna

**Hóast FCK og Brøndby framvegis eru í toppinum, so er stóra samrøðuevnið í donskum fótbólti, at uppflytararnir úr Farum og Køge enn eina ferð fingu fult á útivølli**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað eru tey trý feløgini, sum undan kappingarbyrjan vóru favorittar, ið eru á trimum teimum fremstu plássunum í superliguni. Men tað vóru avgjørt ikki FCK, AaB og Brøndby, sum fingu mestu positivu umrøðuna eftir tólvta umfarið, sum varð spælt í vikuskiftinum.

Tað verður mest tosað um uppflytaraliðini Køge og Farum. Felags fyri tey bæði er, at tey hava verið roknað sum upplagd evni at flyta niður aftur. Og tað er eisini felags fyri uppflytararnar, at teir higartil so rudduliga hava gjørt rokningini til skammar.

Sunnudagin settu tey nýggja striku undir, at tey megna at standa seg á útivølli, eisini um mótstøðuliðini teljast millum tey gomlu og sigursvandu í donskum fótbólti.

Farum var sunnudagin í Esbjerg, og teir komu til hús aftur við 2–0 sigri. Nichlas Hindsberg skoraði fyrra málið beinanvegin eftir steðgin. Esbjerg kiksaði uppspæl, og fyrrverandi Lyngby spælarin, sum fyri trimum vikum síðani varð mettur at vera so knæskaddur, at hann ikki fór at spæla aftur, hevði hálvan vøllin fyri seg sjálvan, áðrenn hann sneiddi framvið málverjanum og skoraði. Seinna málið skoraði David Rasmussen beinleiðis upp á fríspark, og Farum sigurin var uppiborin.

Køge var í Århus. Tey fyrstu umførini í nýggju kappingini stóð AGF seg væl, tað bar stórar áskoðarafjøldir við sær, og tað varð roknað við, at AGF nú skuldi stríðast um heiðursmerkini. Men fleiri tær seinastu ferðirnar hevur gingið illa, og úrtøkan hevur verið sera soltin.

Fýra av føstu monnunum hjá Køge vóru ikki við í Århus. Tað hevði við sær, at ein av gomlu liðfeløgunum hjá Óla Johannesen í Hvidovre, Henrik Eggerts, fekk møguleikan, og hann tók so rudduliga møguleikan, skoraði og gjørdist dagsins maður. Køge vann 3–1. Teir hava íalt fingið 16 stig, og tað er merkisvert, at trettan av stigunum hava teir vunnið á útivølli. Tað eru seks umfør eftir, áðrenn superligan fer í vetrarfrí, men í Køge hava teir longu næstan fingið tey stigini, sum teir høvdu roknað við at fingið hesumegin jólini.

**Oddaliðini vunnu ikki**

FCK, AaB og Brøndby mynda ovasta plássini í superliguni. Men einki av oddaliðunum fekk fulla úrtøku í tólvta umfarinum.

Stephan Andersen er ein av gomlu liðfeløgunum hjá Óla Johannesen í Hvidovre. Hann er nú málverji í AB. Har er tað sum á føroyska landsliðnum. Veteranmálverjin Jan Hoffmann, sum hevur verið sjúkur, heldur seg vera nóg góðan at verja málið. Hann og nýggi málverjin stuðla hvørjum øðrum undir venjing, men teir eru kappingarneytar um plássið ímillum stólparnar.

Tá Brøndby var í Gladsaxe, var Stephan Andersen málverji hjá AB. Úrslitið var 1–1, og tað var vónbrot fyri Brøndby og størsta partin av teimum 7.321 áskoðarunum, sum vóru komnir úr Brøndby.

AB kom á odda seks minuttir eftir hvíldina, og Brøndby javnaði beinanvegin. Síðstu løtuna trýsti Brøndby, og Michael Laudrup rósti AB málverjanum fyri gott avrik. Brøndby skal hava nýggjan málverja, tí Mogens Krogh fer at gevast á jólum. Nú verður gitt, at kanska verður 20 ára gamli Stephan Andersen nýggjur málverji í Brøndby ella kanska Jan Hoffmann.

Fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum endaði tað málleyst, tá OB sunnudagin var í Viborg. Heimaliðið hevði allar møguleikar at vinna. Í 47 minuttir vóru teir ellivu ímóti níggju, teir høvdu bóltin nógv, og teir løgdu ofta innfyri málið, men teir megnaðu ikki at fáa bóltin framvið væl spælandi Karim Zaza.

Í Aalborg var tað veitslurómur undan dystinum. Teir tóku nýggjan part av nýmótans stadion í nýtslu. Men undir dystinum var lítið at fegnast um hjá nógvu heimaáskoðarunum. Teir vóru vitni til triðja AaB tapið á heimavølli á rað. Serliga meint mundi tað kennast, at tað var botnliðið úr Silkeborg, sum vann 4–3 og harvið av álvara kom í námd av hinum liðunum, sum stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting.

Longu leygardagin var FCK í Parkini. Gestirnir vóru FCM, sum hósdagin skulu royna seg í UEFA Cup. Teir royndu uppskriftina, sum teir ætla at nýta ímóti belgiska Anderlecht, og tað hilnaðist væl. Peter Møller legði FCK á odda í 1. hálvleiki, men FCM javnaði í 2. hálvleiki.

# Todi sleppur ikki framat

**Føroyski álopsspælarin í FCK heldur seg ikki hava spælt seg av liðnum, men tað er venjarin, sum ger av, hvussu liðið skal síggja út, og hann tykist ikki vilja hava føroyingin ímillum teir fyrstu**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Todi Jónsson fær fáar og smáar møguleikar at vísa á besta liðnum hjá FCK, hvør dugur er í honum.

– Tað hevur ikki verið serliga hugaligt síðsta mánaðin. Eg haldi ikki, at eg havi spælt meg av liðnum, men tað er venjarin, sum setur liðið. Eg eri noyddur at virða avgerðina hjá honum og so undir venjing og í dystum at royna at sannføra hann um, at eg eigi rætt til pláss á liðnum.

Hetta segði Todi Jónsson á heimasíðuni hjá sær undan vikuskiftinum. Tá ið FCM var í Parkini leygardagin, var svenski álopsspælarin Jörgen Pettersson ikki tøkur. Tað hevði við sær, at Todi var eykamaður hjá FCK, meðan Zuma og Peter Møller vóru í álopinum.

Beinanvegin eftir steðgin kom Todi á vøllin, tí Peter Møller hevði fingið eina skeinu í høvdið.

Todi var í álopinum við síðuna av Zuma, men teir fingu einki mál. Einasta FCK málið kom tveir minuttir undan steðginum. Peter Møller skoraði, eftir at Thomas Røll hevði lagt innfyri úr vinstru, og bóltsurin var stokkin frá liðformanninum Peter Nielsen og til Peter Møller.

**Sáttmálasamráðingar**

Hvørki Todi ella nakar annar sigur nakað um tað. Men tað tykist vera ein partur av orsøkini til, at hann ikki sleppur upp í part, at Todi ikki enn hevur skrivað undir nýggjan sáttmála við FCK. Leiðslan í felagnum hevur viljað hava spælararnar, sum hava sáttmála fram til 30. juni komandi ár, at skriva undir nýggjar sáttmálar nú í heyst. Men Todi hevur ikki enn skrivað undir.

At Todi ikki sleppur á liðið, ger tað sjálvandi truplari hjá honum at verða seldur til nakað annað felag. Reglurnar eru soleiðis, at spælararnir hava rætt at samráðast við onnur felag eitt hálvt ár frammanundan, at teir eru leysir av sáttmálanum, sum nú er galdandi. Tað vil við øðrum orðum siga, at um Todi ikki hevur skrivað undir nýggjan sáttmála við FCK á nýggjárinum, so hevur hann eftir nýggjár rætt at samráðast við onnur feløg, og so kann FCK ikki krevja pening fyri hann, tá hann í summar fer frá teimum. Men tað er sjálvandi truplari at selja seg sjálvan av beinkinum ella av 2. liði enn sum fastur maður og málskjútti á besta liðnum.

Men enn er rúm tíð til nýggjárs og uppaftur rúmari tíð til 1. juli. Todi hevur fyrr í ár sagt, at hann ikki er so fegin um at sita á beinkinum, og at hann vil hava ábending um, hvussu vánirnar vera at spæla.

Í síðstu viku vistu danskir fjølmiðlar at siga, at FCK er í samband við australskan álopsspælara, sum teir umhugsa at skriva sáttmála við.